## Jarðskjálvti við Svalbard

Fyrrapartin í gjár skalv havbotnurin við Svalbard av einum jarðskjálvta, sum sambært norska jarðfrøðistovninum var 5,1 á Richterstiganum. Mátingar vístu, at miðdepilin í skjálvtanum var 150 fjórðingar í útsynning úr Longuerbýnum og einar 450 fjórðingar í útnyrðing úr Tromsø. Jarðfrøðingurin Jan Fyren sigur við norsku tíðindastovuna NTB, at skjálvtin var so mikið harður, at fólk í Longyerbýnum mundu merkja hann. Hetta er annar jarðskjálvtin við Svalbard seinastu mánaðarnar. Í mars var ein jarðskjálvti í útnyrðing úr oyggjunum. Hann var 6,4 á Richterstiganum.



## Mærsk broytir kós

Tey seinastu árini hevur A.P. Møller - Mærsk brúkt einar 60 milliardir árliga til skipakeyp, men nú verður lokið lagt á kassan, skrivar Berlingske Tidende. Ístaðin fyri fer felagið at gera íløgur í vinnugreinar, sum løna seg betur. Nils Søndergaard, forstjóri, sigur við blaðið, at reiðaríið Maersk Line hevur givið lítið av sær tey seinastu árini, og at tað er torført at fáa fíggjarligan vinning burtur úr siglingini. Tí fer felagið at leggja á annan bógv og at gera íløgur í olju og havnir ístaðin fyri. Umframt vanliga endurnýgging hevur Maersk Line brúkt nógvar pengar tey seinastu árini til at keypa kappingarneytar Sealand og P&O Nedloyd.

# Byrja Buzz Aldrin í morgin

**Upptøkurnar til raðsendingina Buzz Aldrin byrja í morgin, og onkrar av upptøkunum krevja heilt upp til hundrað statistar**

FILMSUPPTØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Leikstjórin, Geir Henning Hopland, høvuðsleikarin, Pål Sverre Hagen og danska Rikke Lylloff uttanfyri Norðurlandahúsið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Norðurlendska filmsliðið stendur nú við enn ein varða á leiðini at framleiða teir fýra partarnar av raðsendingini, Buzz Aldrin.

Longu í 2005 var leikstjórin, Geir Henning Hopland fyrstu ferð í Føroyum í sambandi við raðsendingina, og tá fekk høvundurin, Johan Hattstad, sannført hann um, at hetta var rætta skaldsøgan at gera til film.

Tað hevur tikið sína tíð at fáa fíggingina upp á pláss, men nú er so klárt at fara undir upptøkurnar, sum fyrstu tíðina fara fram í Tórshavn.

- Í fyrsta umfari verða vit seks vikur í Føroyum. Tilsamans skulu vit taka upp fýra partar, sum hvør verður 58 minuttir langur, sigur Geir Henning Hopland.

Tað hevur tikið sína tíð at savna leikararnar, og høvuðsleiklutin sum Mathias hevur norski sjónleikarin Pål Sverre Hagen fingið.

- Tað hevur verið við spenningi, at eg gjøgnum casting eri sloppin gjøgnum nálareygað og havi fingið hendan leiklutin, sigur Pål Sverre Hagen.

Hann er ikki púra óroyndur innan sjónleik, og hevur verið við í bæði filmi og í sjónleiki áður.

### Nógvir statistar

Fyrr í vár vóru norðmenninir í Føroyum aftur fyri at finna hóskandi locations, og sum skilst verður ein stórur partur tikin upp við Gjógv. Men sum nevnt verður eisini nógv tikið upp í Havn, ein jarðarferð skal takast upp í Saksun, umframt at upptøkur eisini verða gjørdar í Suðuroy.

Tað er ein drúgv uppgáva at taka film upp, og í meðal verður roknað við, at tríggir minuttir og 20 sekund koma í kassan dagliga av effektivari upptøkutíð.

Samstundis skulu eisini brúkast nógvir statistar í filminum. Herfyri varð sóknast eftir fólki, sum kundu verða við til eina jarðarferð, sum skal takast upp í Saksun, og har skulu teir brúka ikki færri enn eitthundrað statistar.

Kortini sigur Geir Henning Hopland, at tað hevur gingist væl at finna tey fólkini, sum teir skulu brúka til upptøkurnar.

### Langur tíðarhorisontur

Sum longu nevnt varð so smátt farið undir fyrireikingar til upptøkurnar í 2005. Nú, fýra ár seinni, byrja upptøkurnar so, og tíðarætlanin sigur, at teir fýra partarnir verða sendir í sjónvarpi á heysti 2010.

Higartil hava sjónvarpini í Noregi, Svøríki, Finlandi og Føroyum verið við til at stuðla upptøkunum fíggjarliga, og tað verður eisini í hesum fýra londunum, at raðsendingin fyribils verður víst.

Men skaldsøgan er komin út í 11 londum higartil, og er á veg á amerikanska marknaðin, so vónað verður, at onnur lond fáa eyguni upp fyri raðsendingini.

### Norðurlendsk manning

Sum longu nevnt eru fleiri føroyingar við í raðsendingini, og onkur teirra hevur onkran av størru leiklutunum. Onkur dani er somuleiðis við, at tað er alt hent gjøgnum castingina.

Rikke Lylloff er ein teirra. Hon hevur gingið á sjónleikaraskúla í Odense, og umvegis eitt uppslag á skúlanum hevur hon so fingið ein av størri hjáleiklutunum.

Nú lærir hon seg so at tosa »gøtudanskt« við góðari hjálp frá Beintu Clothier, sum eisini gongur á sama skúla í Odense.

Upptøkurnar byrja so í morgin og halda fram í seks vikur, har Havnin verður útgangsstøði. Tilsamans verður roknað við at upptøkurnar fara at vara í 13 vikur. Upptøkurnar fara eisini fram í Oslo, men stóri parturin verður altso upptikin her í Føroyum.

samskip



> Samskip søkir eftir formanni til frystigoymsluna í Kollafirði

Lønsambært avtalu.

Samskip P/F
Bryggjan
FO-410 Kollafjørður

> Fyrirtøkan
Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er eintann størsta bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.